Myndir: Áki Bertholdsen





# Lata uppaftur mikudagin

**Starvsfólk, børn og foreldur fáa nakrar dagar at koma fyri seg aftur í, men mikudagin fer dagstovnurin við Løgmannabreyt at taka børn innaftur**

HERVERK

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er nú greitt, at Dagstovnurin við Løgmannabreyt tekur ímóti børnum aftur mikudagin eftir umfatandi herverkið mikudagin.

Tað varð avgjørt á fundi ímillum býráðið og starvsfólkið á stovninum í morgun.

Annars hava tey arbeitt at kalla í døgndrift við at vaska og taka upp eftir herverkið og tað eru tey við at vera liðug við, so fyri tað, kundu tey tikið ímóti børnum mánadagin.

Men Býráðið og starvsfólkið eru samd um, at geva børnum, starvsfólki og foreldrum tveir dagar í næstu viku at koma fyri seg aftur í.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at tað er rættiliga nógv, sum skal keypast av nýggjum, bæði leikur, telda, telefonir og alt møguligt annað, sum skal til fyri at endurreisa stovnin og tað verða teir næstu dagarnir so brúktir til.

Hinvegin er nógv annað stórarbeiði, sum eisini skal gerast, eitt nú skulu veggir málast, tí teir eru útsmurdir við tussj, men tað arbeiðið verður gjørt so líðandi tað næstu tíðina.

Nú fara tey so at ringja runt til foreldrini at greiða teimum frá støðuni.

Tey foreldur, sum vilja hava børnini heima, kunnu so gera tað. Men vilja foreldur hava børnini í ansing frá mánadegnum, verður ongin trupulleiki at herberga teimum á øðrum stovnum í Havn.

Heðin Mortensen sigur, at serfrøðingar á Barna og ungdómsdeildini hjá býráðnum fara nú at tosað við starvsfólkini og fyrireika tey at taka ímóti børnunum aftur og tey verða eisini til staðar mikudagin og tosa við børn og foreldur, tá ið stovnurin letur uppaftur.

# Forskrúvað spæl í barnagarðinum

**- Ein stendur púra spyrjandi um, hvat fær smábørn at gera slíkt herverk, sigur sálarfrøðingurin, Heri Kragesteen**

SÁLARFRØÐI

*Snorri Brend*

**Hoyvík:** Eins og so nógv onnur, kom hendingin í barnagarðinum við Løgmannabreyt púra óvart á hann.

Sum sálarfrøðingur sær hann eitt slíkt herverk út frá fakligum fortreytum, og hann staðfestir tí stutt yvirfyri Sosialinum:

- Hetta var so ikki vanligt barnaspæl, men ein má vist heldur kalla slíkt fyri rættiliga forskrúvað spæl!

Heri Kragesteen vísir til tað kenda dømið um tey húsini í bygdini, og sum standa tóm rættiliga leingi: Fyrst verður ein einstakur rútur brotin, síðani tann næsti og aftur ein. Næstu løtuna eru allir rútarnir og hurðin brotin, og húsini í sori innan!

- Men eg dugi sera illa at skilja, at børn kunnu finna uppá at gera slíkt herverk í einum barnagarði, sigur Heri Kragesteen.

## »Fluernes Herre«

Fá dømi munnu vera um so grov herverk, men tær »mekanismurnar« ið kunnu føra til slíkar gerðir, eru kortini lýstar í bókmentum.

Mong hava helst lisið bókina »Flugudrotturin« eftir William Golding.

Tá Heri stutt skal lýsa ógvusligu hendingina við Løgmannabreyt, so er innihaldið og gongdina í bókini helst tað sum kann lýsa hetta best.

Her enda fleiri skúladreingir á eini oydnari oyggj, har teir skulu royna at lívbjarga sær. Teir sleppa at ráða einsamallir fyri borgum, tí eingin vaksin er at siga teimum ímóti ella at rættleiða teir.

Úrslitið av hesum er, at teir lata instinkt síni ráða, og hevur hetta sera ógvusligar avleiðingar við sær, tá tað ringasta og myrkasta í menniskjanumsoleiðiskemur undan kavi.

- Tað er ikki vanligt at føroysk børn finna uppá at gera slík herverk.

- Men her er okkurt løgið hent, og sum hevur viðført hesa sera ógvusligu hendingina, sigur Heri Kragesteen.





